## Dragan aftur í B71

Dragan Kovacevic og B71 hava gjørt avtalu fyri kappingarárið 2008. Serbin, ið var venjari hjá B71 í 2006, skal virka sum ungdómsvenjari. - B71 metir tað vera avgerandi neyðugt fyri nútíðina og framtíðina at fáa skapt karmar fyri góðari barna/ungdómsvenjing. Við Dragan hevur felagið fingið ein sera nærlagnan og dugnaligan venjara, skrivar heimasíðan hjá B71.Dragan Kovacevic var í fjør venjari á Skála, men var sagdur úr starvinum.



## Ongan verjuspælari til Sands

B71 hevur í vetur leitað eftir nýggjum miðverjuspælara, eftir at danin Anders Rasmussen er fluttur aftur til Danmarkar. Hetta hevur tó ikki eydnast felagnum. - Nógv prát hevur verið um at fáa fatur á einum verjuleikara afturat, men tað vísir seg at vera trupult at fáa fatur á einum tílíkum til tann prís, ið felagið er ført at gjalda. Tí talar nógv fyri, at venjarin blandar kortini við teimum leikarum, ið hann hevur til taks og ikki skal rokna við meiri styrki uttanífrá, skrivar heimasíðan hjá B71.

# Fyrsti sigurin

**SÍ hevur í ár verið sera vælspælandi í Meistaradeildini hjá bæði monnum og kvinnum. Í mansdeildini hevur talan verið um tættan dyst við ÍF og Mjølnir, men nú byrjar Fleyr at bíta frá sær eisini**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Fleyrliðið, ið er styrkt við leikarum úr Fram, sum hevur tikið Meistaradeildsliðið úr kappingini, vann heldur óvæntað á oddaliðnum SÍ, um vikuskiftið.

Roknað varð við at hetta varð góður styrkur, men at teir beinleiðis skuldu fara at vinna móti oddaliðnum, var ikki roknað við. Sum skilst raktu SÍ ikki dagin, og var tað kanska heppið, at ávaringin kom frá Fleyr. Í løtuni telja tap móti ÍF og Mjølnir dupult, tí tey eru so ómetaliga jøvn í oddinum.

### Fleyr trýr uppá møguleikan

Við sigrunum í dag eru Fleyr bert 3 stig aftanfyri oddaliðið SÍ og so avgjørt kandidatar til oddastríðið um FM. Stigini eru hálveraði, og tá Fleyr onki stig hevði, so mistu teir heldur onki. So sigast kann at øll kappingin er víðopin aftur.

Fleyr fekk styrk frá Fram herfyri, tá hesir tóku lið sítt úr kappingini. Sigmund av Teigum, Jens Heri Bolstad Mortensen og Suni Juul Petersen, eru teir umtalaðu, og teir vóru veruliga við til at lyfta spælið upp í eina hægri eind.

- Vit hava fingið styrk úr Fram, og teir pressaðu sum óðir, og hetta fekk allar at pressa, og spælið gjørdist av tí sama sera trupult hjá gestunum úr SÍ, sigur Høgni Viderø, ein av styrkunum á Fleyr liðnum.

- Vit ætla okkum at spæla okkara møguleika fult út, og tann næsti dysturin fer longu at vísa, hvar vit flóta á styrkislistanum, sigur Høgni og leggur afturat at teir trúgva uppá, at teir megna at vinna teir dystir, ið eftir eru, og at teir harvið koma at liggja væl fyri á stigatalvuni, tá árið er av.

Næsti dysturin hjá Fleyr er á útivølli móti Mjølnir, og har fáa teir veruliga møguleikan at vísa, hvør styrkur er í teimum.



# Fyrra steypakappingin í estetiskum fimleiki

FIMLEIKUR
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið var fyrra steypakappingin í estetiskum fimleiki hildin í Høllini í Runavík. Nógvir áskoðarar høvdu leitað sær í høllina, og teir fingu eina sera góða fimleikauppliving.

Framførðslurnar mugu sigast at vera framúr góðar, tá hugsað verður um, at fimleikararnir bert hava vant í stutta tíð, og als ikki kunnu metast at vera í toppvenjing enn. Men hóast tey, sum luttóku, høvdu flottar framførðslur, so vóru tað uttan iva fleiri lið, ið hildu seg aftur, tí at kappingin liggur so tíðliga á árinum.

Tað var Støkk, sum gjørdist stóri vinnarin við trimum gull, einari silvur og einari bronsu. Havnar Fimleikarafelag var nummar tvey samanlagt við tveimum gull, trimum silvur og einari bronsu.

Seinna steypakappingin verður í Høllini á Hálsi 30. mars. Fimleikasambandið væntar, at fleiri lið fara at luttaka í tí kappingini, tí tá hava liðini havt munandi longri venjingartíð.

Samanlagda úrslitið gevur steyp til ognar.




*So er fimleikarárið farið av bakkastokki. Hóast luttøkan ikki var stór, so vóru framsýningarnar um vikuskiftið tó sera flottar – serliga tá hugsað verður um, at tær ikki hava havt langa tíð at vant.*

*savnsmynd*

| | |
|---|---|
| **Pinkur:** | |
| Nr. 1 HFA | 14,33 |
| Nr. 2 StøkkA | 14,28 |
| Nr. 3 Støkk B | 12,45 |
| Nr. 4 HFB | 11,58 |
| Nr. 5 Flog | 11,00 |
| **Gentur:** | |
| Nr. 1 Støkk | 15,53 |
| Nr. 2 HFA | 15,18 |
| Nr. 3 Flog | 12,13 |
| Nr. 4 HFB | 12,02 |
| **Kvinnur** | |
| NR. 1 HF | 15,92 |
| **Smágentur:** | |
| Nr. 1 Støkk | 14,47 |
| Nr. 2 HFA | 14,18 |
| Nr. 3 HBB | 13,75 |
| Nr. 4 Ljósið | 13,15 |
| **Kv. Unglingar** | |
| Nr. 1 Støkk | 14,14 |
| Nr. 2 HF | 14,13 |
| Nr. 3 Ljósið | 13,95 |